# 90 bátsmanningar hava boðað frá luttøku

**Royndirnar siga, at tað ongantíð er samsvar millum talið á manningum, sum boða frá luttøku, og teimum sum luttaka í kappróðrunum**

FM KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*



*Tað verða ikki færri enn 90 bátsmanningar, sum í ár fara at stríðast um FM-gullið í ymsu bátabólkunum*

Um talið á manningum, sum hava boðað Róðrarsambandinum frá, at tær ætla at luttaka í FM kappingini, verður tað sama, sum luttøkutalið í róðrunum í summar, so verður ofta neyðugt við innleiðandi róðrum og finalu-róðrum.

90 bátsmanningar hava boðað frá, at tær ætla sær at taka lut. Sum tað hevur verið vanligt tey seinnu árini, so er talið á gentumanningum størst, og talið á dreingjamanningum er næststørst. Feløgini hava boðað RSF frá, at 22 gentumanningar ætla sær at luttaka í FM kappingini og at 20 dreingjamanningar ætla sær at vera við.

Lægsta luttøkutalið er tað fyri 10-mannaførini. Seks 10-mannafør hava boðað frá luttøku, og tað kann væl vera, at tey vera uppaftur færri, tá ið kappingarnar fara at koma fyri. 6-mannaførini við kvinnum eru fjúrtan og 6-mannaførini við monnum eru fimtan. 8-mannaførini, sum hava boðað frá luttøku, eru trettan.

### Hámarkið er átjan

Fyrsta FM kappingin verður á Norðoyastevnu, sum verður í Klaksvík annan leygardag. Fyrsta ábendingin um, hvussu ymsu manningarnar eru fyri, fer at fáast komandi vikuskifti, tá ið tað verður bygdastevna á Skála.

Róðrarøkið í Klakvík er soleiðis skapað, at tað ikki ber til at hava fleiri enn átjan bátar við í einum róðri. Tað vil við øðrum orðum siga, at tað verður neyðugt við innleiðandi kappingum bæði hjá dreingjunum og gentunum, um allar manningarnar, sum hava boðað frá luttøku í hesum róðrarárinum, fara at møta upp til fyrsta FM róðurin. Í prinsippinum eru allar 90 manningarnar meldaðar til róðurin á Norðoyastevnu. Tað er bara talan um eina tilmelding til FM kappróður, og hon hevur verið. Nú fæst at síggja, hvussu nógvar manningar fara at melda frá til ymsu róðrarnar.

### Luttakararnir

5-mannaførini við gentum, sum hava boðað frá luttøku, eru hesi: Aldan, Báran, Beinta, Blikur, Drekin, Dúgvan, Falkur, Firvaldur, Fípan Fagra, Frúgvin, Havfrúgvin, Havørnin, Hulda, Junkarin, Kollur, Royndin Fríða, Sílið, Spógvin, Súlan, Tekla, Tjaldrið og Ørnin.

5-mannaførini við dreingjum, sum hava boðað frá luttøku, eru hesi: Aldan, Báran, Beinta, Blikur, Drekin, Dúgvan, Firvaldur, Fípan Fagra, Frúgvin, Havfrúgvin, Havørnin, Junkarin, Kollur, Royndin Fríða, Sílið, Spógvin, Súlan, Tekla, Tjaldrið og Ørnin.

6-mannaførini við kvinnum, sum hava boðað frá luttøku, eru hesi: Fortuna, Fuglfirðingur, Gongurólvur, Hósvíkingur, Hvessingur, Jarnbardur, Kollfirðingur, Lómur, Páll Fangi, Riddarin, Smyril, Snopprikkur, Sølmundur og Víkingur.

6-mannaførini við monnum, sum hava boðað frá luttøku, eru hesi: Fortuna, Gongurólvur, Hósvíkingur, Hvessingur, Jarnbardur, Kollfirðingur, Lómur, Páll Fangi, Riddarin, Smyril, Snopprikkur, Strálan, Sundabáturin, Sølmundur og Víkingur.

8-mannaførini, sum hava boðað frá luttøku, eru hesi: Argjabáturin, Fríggjarin, Gullbrandur, Heiðabáturin, Knørrur, Kvívíkingur, Miðvingur, Nevið Reyða, Sandavágsbáturin, Teistin, Toftabáturin, Víkabáturin og Ørvur.

10-mannaførini, sum hava boðað frá luttøku, eru hesi: Eysturoyingur, Havnarbáturin, Kjølur, Nólsoyingur, Vágbingur og Vestmenningur.

Tá ið vit leysliga hava spurt okkum fyri, hava vit fingið at vita, at samlaða talið á manningum, sum higartil hevur vant nógv og miðvíst, ikki er omanfyri hálvt hundrað. Gentubátarnir eru 10-12, dreingjabátarnir einir 10, 6-mannaførini við kvinnum 6-8, 6-mannaførini við monnum umleið 10, 8-mannaførini 4-6 og 10-mannaførini 4-5.

GÍ-Skála:

# Johan vitjar aftur í Gøtu

**Í kvøld, mikukvøldið verður dystur millum GÍ og Skála leiktur í Gøtu**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Upprunaliga skuldi hesin dysturin ikki verði leiktur fyrr enn 22. juni, men Intertoto luttøkan hjá GÍ hevur ført við sær, at dysturin nú er framskundaðu til mikukvøldið kl. 19.00.

### Finna stevið

Og stendur tað til heimaliðið, so er einki at ivast í, at landskappingarstevið nú skal finnast.

Í steypakappingini hevur annars gingið framúr, men í landskappingini var liðið fyri tapi í fyrsta dystinum, og tí er alneyðugt við trimum stigum her, um liðið sum vant skal leggja seg út í oddastríðið.

Og nógv bendir á, at tað verður á leið sama fólk, sum tryggjaði finalusessin, sum fer á vøllin í kvøld. Súni Olsen og Pól Ennigarð vóru báðir skaddir til tann dystin, og hóast vónin framvegis er at fáa teir tøkar sum skjótast, so má tað metast ógvuliga ivasamt, um teir eru klárir longu nú.

Hjá Skála tykist einasti missurin at vera ein av tí heilt týdningarmikla slagnum. Jonhard Frederiksberg, sum er fyrsti Skála-leikarin í landsliðsbúnanum, noyddist av vøllinum móti NSÍ, eftir at hann hevði fingið ein stoyt á knæið.

Tískil er ivasamt, um hann verður tøkur til hendan dystin, og tað er einki at ivast í, at tað verður dyggur smeitur fyri kontraspælið hjá liðnum. Eitt spæl, sum teir helst skulu dúva uppá í slíkum dystum.

Og sjálvandi ræður eisini um stig hjá Skála. Kanska eru NSÍ og GÍ á útivølli ikki lættastu dystirnir at byrja kappingarárið við,



*Skálamenn vitja mikukvøldið í Gøtu, har framskundaður landskappingardystur er á skránni*

men fyri tað man tað kennast tungt, um liðið stendur við ongum eftir tvey umfør, og sálarliga vildi tað í øllum førum verið góð barlast, um okkurt munagott fekst burturúr vitjanini í Gøtu.

Sum sagt, so verður dysturin leiktur kl. 19.00, og verður tað Petur Skarðenni, sum fer at døma.

## 2. deild bíðar

Sum vant, so fara vit aftur í ár at fylgja við, hvussu leikur fer í næstbestu føroysku fótbóltsdeildini hjá monnum. Verkfallið hevur tó eisini lagt sínar teymar á blaðframleiðsluna, og tí bíðar umrøðan av hesum til hósdagsblað okkara.

Vit biðja lesarar okkara bera yvir við okkum í hesum

**-jm**


# LUTASEÐIL

Fæst á Statoilstøðunum kring landið



1. Toyota Corolla 1.6 Terra Sedan virði 199.600 kr.
   (Frá Reyni Service)
2. Ferð fyri 2 vaksin og 2 børn virði 19.995 kr.
   við bili Tórshavn-Hanstholm t/r
   við uppihaldi í eina viku í Danland
   ella DanCenter (Frá Smyril Line)
3. Olja frá Statoil virði 10.000 kr.
4. Gávukort frá Thomas Dam á Hálsi virði 10.000 kr.
5. Apex ferðaseðil fyri 2 til DK t/r virði 6.266 kr.
   (Frá Smyril Line)
6. Gávukort frá LM handlinum virði 5.000 kr.
7. Gávukort frá Statoil virði 5.000 kr.
8. Gávukort frá Radiohandlinum virði 5.000 kr.
   v/ E. & P. Persson
9. Føroyskt krov virði 1.000 kr.

Drigið verður bara millum seldar seðlar. Drigið verður mánamorgunin kl. 9.30 á Elektron og lýst í bløðunum 5. og 6. august 2003.
Eisini kann ringjast til Kristiannu tlf. 227 717 · 312 380 · 319 017

Hestprent 314 555

STATOIL

Tórshavnar Ítróttarráð
2003
20 kr.



# KT & Tekstildesign

**á Venjingarskúlanum í Havn**
**4.-14. august**

**Skeiðið er ætlað øllum teimum, ið hava hug at brúka teldu í samband við tekstilarbeiði.**
**Tú ert t.d. hondarbeiðslærari, listhandverkari ella sniðgevi, men enn ikki byrjað at kanna møguleikarnar, ið teldan hevur á tekstila økinum.**

Tú fert at nýta telduna sum arbeiðsamboð og mennir møguleikarnar at vera skapandi og virkin innan tekstila øki.

**Vit fara at arbeiða innan økini:**
- Grundleggjandi kunningartøkni (KT)
- Tekstildesign á teldu
- Hugflog og hugskotsmenning
- Digitalar myndir
- Innskanning og handfaring av skitsum, toyi og myndum
- Samskifti á alnótini

Á skeiðnum verður í høvuðsheitum arbeitt við teimum mongu møguleikunum, ið forritið »Paint Shop Pro« hevur. Nýggjasta bók skeiðleiðarans »Form Farve Fantasi« verður grundstøðið undir frálæruni.

Vit herja á – at nýta amboð og valmyndir í forritinum, innskanna myndir og lutir úr náttúruni, brúka digitalt myndatól, viðgera myndir, arbeiða í løgum, nýta mynstur og litir, gera meskur og brotmyndir (collage) og brúka telduna sum amboð í tí skapandi tilgongdini.

Tú arbeiðir við egnari teldu, og høvi verður at nýta hølið og útbúnað uttan fyri dagligu frálærutíðirnar.

**Skeiðsleiðari:** Britt Sallingboe, handarbeiðslærari, rithøvundur, fjakkari v.m. Lesið meira um Britt Sallingboe á www.danmarksmindsteforlag.dk

**Tíð:** kl. 9.00-16.00
**Luttakarar:** 12 pers.
**Tilmeldingarfreist:** Innan 31. mai
**Luttøkugjald:** 2.000,- kr.

**Tilmelding:** Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli tlf. 317755 ella Jónhild Johannessen tlf. 218087. E-post: jonhild@post.olivant.fo








# Lýsing eftir dagrøktara

Søkt verður eftir dagrøktara til kommunalu dagrøktina í Oyndarfjarðar kommunu at byrja tann 1. juni 2003 ella skjótast eftir hetta.

Lønin verður ásett sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag fyri dagrøktarar.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til Árna Joensen, borgarstjóra á telf. 444545 ella 223714.

Skrivligar umsóknir skulu vera kommununi í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 30. mai 2003 kl. 16.00.

Kommunan skilar sær rætt til at velja millum innkomnar umsóknir ella onga at taka.

Oyndarfjørður, tann 19. mai 2003

**Oyndarfjarðar kommuna**



